## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin og hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 6 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin andøvsgul upp í ein strúk av norði, sunnudagin minni vindur. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 7 og 11 stig.

# Alphabeat á topp 10 í Onglandi



**Tað gongur stak væl hjá donsku Alphabeat í Onglandi og nýggja útgáva teirra er nummar 10 á enska fløguhittlistanum. Seinni í summar vitjar Alphabeat í Føroyum**

**TÓNLEIKUR**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fyri ári síðani fluttu limirnir í Alphabeat til London, fyri at royna seg av álvara har. Hetta tykist nú at eydnast, og fyrsta fløga teirra har, This Is Alphabeat, liggur nummar 10 á enska fløguhittlistanum.

Teirra næsta single, 10.000 Nights, er eisini teirra næsta topp 20 single, og ummælarar standa í røð at rósa bólkinum, ið hevur verið sammettur við svensku ABBA, ið tóku heimin á bóli í sjeytiárunum.

Tað, ið hendir Alphabeat júst nú, er bert hent fyri tvey onnur donsk nøvn tey seinastu 50 árini. Í 1960 vóru tað Nina & Frederik, ið fingu eitt 9. pláss á enska listanum. Og 37 ár seinni megnaði Aqua at koma á 6. pláss. Og nú í 2008 er Alphabeat á 10. plássi.

### Orsøk at fegnast

Alphabeat helt útgávudag hósdagin við at spæla fyrstu konsertina sum høvuðsnavn í London. Hetta hendi á Koko Club, har tey 1400 fólkini stóðu sum sild í tunnu.

Konsertin gekk væl, og The Evening Standard gav 4 av 5 møguligum stjørnum. Og blaðið endaði við at siga, at; The Danes have every reason to celebrate.

Alphabeat vitjar á Summarfestivalinum í Klaksvík seinni í summar.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 15 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 23 |
| London | 24 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 27 |
| Warzawa | 28 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 26 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 25 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 35 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

### LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 997 hPa. í landnyrðing úr Føroyum fer spakuliga eystureftir og dýpist.



**Í dag:**
Millum lágtrýstið við Trondheim og eitt hátrýst vestan fyri Ísland rekur køld luft av norði móti Føroyum

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/06 kl. 06[00] – 10/06 06[00]. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juni: -9,9° - Mesti hiti máldur í juni: 18,3°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 09/06 kl. 06[00] – 10/06 06[00].
Avfallið higartil í juni: 21 mm




I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

3.juni Mánin næstur jørðini
10.juni Fyrra kvarter
16.juni Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. juni | 0:38 | 13:12 | - | 12:12 | - | 12:27 | 2:38 | 15:12 | 3:38 | 16:12 | 11:27 | - | 10:27 | 23:02 | 0:53 | 13:27 | 1:53 | 14:27 | 0:23 | 12:57 | 1:38 | 14:12 |
| 11. juni | 1:47 | 14:21 | 0:47 | 13:21 | 1:02 | 13:36 | 3:47 | 16:21 | 4:47 | 17:21 | 0:02 | 12:36 | 11:36 | - | 2:02 | 14:36 | 3:02 | 15:36 | 1:32 | 14:06 | 2:47 | 15:21 |
| 12. juni | 2:55 | 15:15 | 1:55 | 14:15 | 2:10 | 14:30 | 4:55 | 17:15 | 5:55 | 18:15 | 1:10 | 13:30 | 0:10 | 12:30 | 3:10 | 15:30 | 4:10 | 16:30 | 2:40 | 15:00 | 3:55 | 16:15 |
| 13. juni | 3:35 | 15:55 | 2:35 | 14:55 | 2:50 | 15:10 | 5:35 | 17:55 | 6:35 | 18:55 | 1:50 | 14:10 | 0:50 | 13:10 | 3:50 | 16:10 | 4:50 | 17:10 | 3:20 | 15:40 | 4:35 | 16:55 |
| 14. juni | 4:15 | 16:36 | 3:15 | 15:36 | 3:30 | 15:51 | 6:15 | 18:36 | 7:15 | 19:36 | 2:30 | 14:51 | 1:30 | 13:51 | 4:30 | 16:51 | 5:30 | 17:51 | 4:00 | 16:21 | 5:15 | 17:36 |